# Byggibúgvingin stendur fremst



*Útstykkingin og byggibúgvingin Norðuri í Heiðum er høvuðsmálið hjá Miðvágs Kommunu í løtuni, sigur Jóan Pauli Frederiksen, borgarstjóri*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Stóra málið hjá Miðvágs Kommunu í løtuni er at fáa byggibúgvingina Norðuri í Heiðum lidna. Nógvir fyrispurningar eru um grundstykki, sigur borgarstjórin**

KOMMUNUPRÁT
*Edvard Joensen*

**Miðvági:** Byggibúgvingin hjá Miðvágs Kommunu Norðuri í Heiðum skal gerast liðug, so fólk kunnu sleppa í gongd við at byggja. Ætlanin umfatar 26 grundstykki, men einir 30 fyrispurningar eru um grundstykki, sigur borgarstjórin. Eisini aðrastaðni í bygdini verður møguleiki at fáa grundstykki.

Jóan Pauli Frederiksen, borgarstjóri í Miðvágs Kommunu, sigur, at arbeitt verður við at fáa økið liðugt byggibúgvið, áðrenn fólk sleppa í gongd við byggingina.

Við hesum sipar hann til at bygdarráðið metir tað skilabest, at slíkt sum vegir og vatn, kloakkir og el, og hvat nú er at gera hjá kommununi, skal vera liðugt, áðrenn alt ov nógv ferðsla gerst á byggiplássinum. Tað er hesum, arbeitt verður við nú.

Fyrsta stigið er at fáa 12 grundstykki oman fyri verandi veg. Síðan verður farið oman um vegin, og har skulu 14 grundstykki fáast.

Ein ætlan við fýra raðhúsum er á veg Norðuri í Heiðum, sigur borgarstjórin. Tey verða bygd á tvey grundstykki. Annars eru ætlanir um grundstykki á Kirkjabø og Uppi í Húsi.

– Tað er nú einaferð so, at fólk vilja fegin seta búgv har, tey eru uppvaksin, sigur Jóan Pauli Frederiksen, borgarstjóri.

Um útstykkingina Norðuri á Heiðum sigur hann, at har eru eisini fyrispurningar frá fólki, sum ynskja at koma aðrastaðni frá til Miðvágs at búgva. Eisini tykist áhugi vera fyri at keypa eldri hús í bygdini. Tað er serliga fólk, sum flutt er burtur, ið tykist vilja koma aftur til Miðvágs, sum spyr um tað, sigur borgarstjórin.

Hinvegin hevur vinnan ikki víst sama áhuga at koma til Miðvág, nú undirsjóvartunnilin verður veruleiki, sigur hann.

## Barnaansingin

Umstøðurnar hjá barnaansingini í Miðvági verða munandi betraðar. Gamli Skúli verður gjørdur í stand til endamálið.

Tað verður í løtuni lagt nýtt tak á Gamla Skúla í Miðvági. Hann skal brúkast til barnagarð, tá hann er settur í stand, sigur borgarstjórin.

Tað fáast tríggjar stovur í niðaru hæddini til barnagarðsbørnini at ganga í. Tað verða tey smærru børnini, sum fara at halda til í niðaru hædd, meðan tey størru fara at húsast á loftinum.

Miðvágs Kommuna hevur eina tíð havt sonevndan útibarnagarð, har størru børnini í barnagarðsaldri hava gingið, meðan tey yngru hava verið í dagrøkt.

Hóast Gamli Skúli nú verður gjørdur til barnagarð, verður dagrøkitin kortini ikki heilt niðurløgd, sigur Jóan Pauli Fredriksen, borgarstjóri.

Gamli Skúli hevur fyrr verið nýtur til ymisk endamál. Eitt nú hevur dagrøktin verið í bygninginum nakrar dagar um vikuna, eins og skótarnir eisini hava hildið til har. Okkurt annað frítíðartiltak hevur eisini verið í Gamla Skúla. Men hesi tiltøkini verða nú noydd at flyta, sigur borgarstjórin.

Kommunan ætlar kortini ikki, at tey, sum húsast hava í Gamla Skúla, skulu vera húsvill. Samráðingar eru í løtuni við Brøðrasamkomuna um keyp av Salem, sum so ætlandi kann gerast til bygdarhús ella so, sigur borgarstjórin.

Brøðrasamkoman hevur í umbúna at byggja nýtt við betri parkeringsmøguleikum aðrastaðni í bygdini, og er tí áhugað í at selja gamla samkomuhúsið, sum kommunan saktans kann brúka, sigur hann. Málið er kortini ikki avgreitt enn, tí eitt nú øki ikki er funnið at byggja nýtt samkomuhús á.

## Viðlíkahald

Í aðrar mátar er tað mest viðlíkahald, sum stendur á skránni hjá Miðvágs Kommunu í komandi tíð.

Kommunalir vegir eru nógvir, og teir eru ikki í serliga góðum standi allir, letur borgarstjórin at. So tað fyrsta verður at asfaltera vegir, sigur hann. Í ár er ein millión sett av til hetta endamálið, men hon røkkur veri enn so til alt asfaltarbeiðið, sum neyðugt er. So tað fer at ganga yvir nøkur ár.

Umframt verður vist neyðugt at leggja nakrar nýggjar vegir, sigur borgarstjórin.

Hann vísir á, at ikki altíð hevur veirð hugsað nóg langt, tá útstykkjað hevur verið, tí ov nógvar brekkur eru í Miðvági.

Eisini eru vegir, sum treingja til ábøtur ella kanska nýgerð. Eitt nú vegurin niðan í Kálvalíð, har rættiliga nógv ferðafólk kemur. Har er ringt at koma til við bussum. So tað verður eitt mál, sum takast má upp nakað skjótt, heldur borgarstjórin í Miðvági.

Tvær eru bygdirnar í Miðvágs Kommunu. Umframt Miðvág hoyra eisini Vatnsoyrar til kommununa.



*Gamli Skúli í Miðvági verður umvældur at brúka til barnagarð*
*Mynd: Edvard Joensen*






*Elida Niclasen er einasta kvinnan í Undirhúsinum. Hon passar kaffimaskinuna. Frits Witt er eisini fastur fúsur í Undrhúsinum*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Royna at betra heimin

**Í undirhúsinum í Miðvági hava tey fleiri boð upp á, hvussu verðin kann gerast betri at liva í. Men tað er bara ikki altíð, at verðin vil lurta eftir teirra góðu hugskotum**

MORGUNPRÁT
*Edvard Joensen*

Miðvági: – Vit royna at koma við góðum hugskotum um, hvussu tað kann ganga betri í verðini, men tað er verri enn so altíð, at verðin vil lurta eftir okkum, siga tey í Undirhúsinum í Miðvági.

Miðvingar hava, sum so manga aðrastaðni, eisini eitt undirhús, har fólk hittast at viðgera tað, sum rørir seg. Bæði heima í lokalsamfelagnum, men eisini víða úti í heimi.

Klokkan er átta á morgni, og tað er longu nakað av fólkið komið í Undirhúsið. Tey halda til í MB húsinum, og eru har frá tíðliga á morgni til út á fyrrapartin.

Sum vera man eru tað tilkomin fólk, sum givin eru at arbeiða, ella hava slíkar tíðir, at tey hava stundir at sita her og fáa tað seinasta við soleiðis út á fyrrapartin.

Ein ungur maður situr kortini við eitt borð og fær sær kaffi. Tað verður undrast á, hvussu hann hevur tíð at sita her og ikki er á útróðri. Gott veður er, og bátarnir hava fingið eitt sindur, veit onkur at siga.

– Nei, hann sleppur ongan veg, tí nú eru eingir fiskidagar eftir, og so má hann bara hava feriu. Eingi fiskiloyvi verða givin hesa vikuna, heldur hann.

## Grind

Og tað er so góðum líkt, tað, sum tosað verður um. Hendan dagin, Sosialurin stakk inn á gólvið, var tað grind, sum var á skránni.

Grind var deyð í Bø dagin fyri, so eyðvitað varð tosað um, hvussu skarst. Vóru partarnir stórir, og var grindin góð?

Jú, tað var í lagi, helt onkur. Parturin royndist betri enn í teirri fyrru, hóast báðir vóru líka stórir á seðlinum hjá sýslumanninum.

– Tað kann vera tí, heldur nú ein annar, at hvalirnir í Bø vóru størri, og færri partar at býta.

Jú, so var tað tað, at onkur helt ikki, at tvøstið var so gott, sum tað onkuntíð hevði verið.

– Tað er einki serligt at fáa eina hon, sum mjólkar. Heldur ikki spikið nyttar nakað tá, verður hildið fram.

– Nei, veit tann triðji at siga. Eg fekk einaferð burtur av einum sovorðnum hvali, og tað var ikki etandi. Spikið varð brúnt, tá tað varð kókað, og tað fall bara saman. Einki vert.

Men onkur annar heldur so, at ein mjólkandi kvennhvalur er í grundini besti hvalurin at fáa, tí hon hevur mjólkað alt kyksilvurið og PCB-ið úr sær. Tað siga kanningarnar, sum gjørdar eru av grind. Tað eru ungar og kallhvalir, ein skal royna at sleppa undan at fáa í part.

Men tað vilja teir gomlu líkasum ikki vera við kortini. Teir leggja ikki so nógv í alt hatta. Vilja heldur doyggja mettir enn at doyggja í hungri, tí alt er farligt at eta.

Men tey sakna, at grind verður hildin til á Miðvági. Tað hevði verið stuttligt at roynt at hildið eini grind til aftur á Miðvági, hóast grótkastið er komið, og sagt verður, at botnviðurskiftini eru broytt, verður tosað.

## Stevnan

Hóast bara nakrir fáir dagar eru til stevnuna, letur til, at tey hava ikki rættiliga fingið skránna við. Hvussu verður við kappróðrinum? vilja tey vita.

Jú, tað er so onkur sum veit, at hann verður ikki fyr enn klokkan fimm. Tað kemst av sjóvarfallinum, og ikki ber til at rógva, tá ein stóru partur av vágni liggur turrur.

Og so verður tosað um, hvussu tey onkuntíð fyrr hava gjørt. Eitt nú verður víst á, at tá fyrstu Vestanstevnurnar vórðu hildnar, í hvussu er tann allarfyrsta, varð róð á vatninum. Men tað er líkasum eingin, sum skjýtur upp at gera tað hesaferð kortini.

So verður prikað við, at hetta verður seinastu ferð, at róð verður á Miðvági yvirhøvur, tí nú skal allur kappróður verða á Sandavági í framtíðini.

Viðmerkinin varð líkasum vend onkrum ávísum, sum arbeitt verður uppá. Men hann er ikki heilt fyri ongum kortini, tí hann veit, at hesin, sum stakk, hevur okkurt tilknýti til grannabygdina, og hann skal nokk fáa aftur. Og so kemur tað.

– Jú, men sært tú. Í København hava teir eisini flutt alt sovorðið út í Ishøj. Teir leggja tað burtur frá stórbýnum.

Jú, hon sat, og so verður flent at tí.

Kappríðing skal eisini vera á sandinum, veit ein at siga frá. Men tað heldur onkur annar ikki vera til stóra nyttu, tí nógvir hestar her vesturi eru so gamlir, at teir noyðast at hava rulluskoytur fyri at koma fram.

Jú, tey eru farin at fyrireika Vestanstevnuna í Miðvági. Eini tvey sklti hanga uttan á MB Húsinum, sum siga frá, at nú skal húsið málast. Og garðurin skal hava sama umgang.

Tey, sum stíla fyri, ætla, at fáa arbeiðið gjørt ókeypis, og heitt verður á so nógv fólk sum gjørligt at møta.

Onkur kaffikanna er við at tømast,og einasta kvinnan, sum inni er, reisist og fer út í køkin at fylla í aftur.

– Hon er ófør, láta teir at, sum eftir sita. Møtir trúliga upp at gera okkum kaffi.

Kaffi, tey drekka, verður fíggjað við umhvørvisrøkt í Miðvági, greiðir ein frá. Tað vil siga, at tey henta tómar fløskur og selja. Peningurin fer so til at keypa kaffi fyri.

Annars er ikki nógvur stuðul latin til Undirhúsið, verður sagt. Borð og stólar hava tey fingið, og MB letur streym og leggur hølið til.